VIÐMERKINGAR

# Greiða, heldur enn fløkja. Vegleiða, heldur enn villleiða - Dimma!

**Í greinarøð sínari um komandi Sandoyarhøllina, tykist tað sum um Dimma, eftir í eina tíð at hava verið eitt rættiliga trúvirðiskent blað, nú aftur loypir um teir lægstu og ridlandi steinarnar í garðinum.**

**Páll á Reynatúgvu**
*borgarstjóri á Sandi*



Sambært heimildunum hjá blaðnum, so skal Sands Kommuna ikki hava pening til at fara undir at byggja høll fyri, ella rættari, ikki kunna útvega sín part av íløgupeninginum til felags Sandoyarhøllina. Hesar upplýsingar er ikki sannar og stava ikki frá okkum, sum umboða Sands Kommunu, og higar hevur heldur ikki nakar frá Dimmu vent sær um hesi viðurskifti.

Tað finst bæði politiskur vilji, og sanniliga eisini peningur hjá Sands Kommunu til at byggja høll fyri. Í hvussu er nógmikið til at rinda tann partin av felagshøllini, sum náttúrliga er okkara. Vit hava seinastu 4 árini savnað pening saman til júst hesa høllina, sum er ein av grundtreytunum fyri trivnaði hjá ungdóminum í okkara oyggj, og sum er eitt vanligt tilboð til borgararnar aðrastaðni í landinum. Júst Sandoyarhøllin, er aðalmálið hjá nývalda kommunustýrinum á Sandi.

Sands Kommuna er tíbetur í teirri støðu, at vit ikki nýtast lántøku til at rinda okkara part av høllini, og eftir øllum at døma nakað betur fyri enn tað. Kortini stendur nógv á í løtuni, og vit eru sera fegin um at tað eydnaðist at endurreisa flakavinnuna í oynni, uttan alt ov nógv hóvasták.

Tað er rætt, at Sands Kommuna framvegis dragsar gamla skuld eftir sær, men vit hava rinda øllum sítt farnu fýra árini, og fara framvegis at hava tann politikkin soleingi eg havi nakra ávirkan á tað. At vit í bestu tíðum samstundis hava lagt nakað av pengi til síðis, kann ikki lastast fyri at vera ein vánaligur politiskur eginleiki.

At ein kommuna sum hevur verið heilt á blámanum fíggjarliga, nú so spakuliga fótar sær aftur, er ein lítil sólskinssøga í gráa gerandisdegnum, og ynskiligt var tíðindaáhugin hjá Dimmu her í Sandoynni, í størri mun bygdi upp, enn breyt niður.

# Norðoya spinnari til sølu

**Nicolina Jensen Beder**



29. august ár 2003 var eg bjóðað til fundar í Klaksvík, og hoyrdi eg her fyri fyrstu ferð um verkætlanina »Ullvirking í Norðoyggjum« – framleiðsla, frálæra, gransking og mentan. Tey høvdu gjørt ein so sera áhugaverdan faldara, ið átti at verið sendur í hvørt hús í Føroyum. Uttan at endurgeva faldaran út í æsir, vil eg bert taka einkult brot, sum lýsa grundgeving og endamál. Áhugabólkurin fyri ullvirking í Norðoyggjum varð skipaður á vári 2001 við tí aðalmáli at keypa »Norðoyar Spinnarí«. Mona Olsen, ið átti spinnaríið, var sera áhuga í hesum máli. Við støði í omanfyristandandi, hevur arbeiðsbólkurin gjørt soljóðandi endamálsorðing:

Endamálið við at keypa »Norðoya Spinnarí« er:

1. At varðveita og menna spinnaríið, fyri at varðveita siðvenju og kunnleika um ullvirking og við støði í hesum at ganga nýggjar leiðir og skapa eina burðardygga framleiðslu.
2. At varðveita mentan og siðaarv til gagns fyri fólkið, ið her býr, eins og vitjandi.
3. At nýta spinnaríið í samband við frálæru innan ull og ulltilvirkan, soleiðis at øllum skúlum kann standa í boði at gera nýtslu av útbúnaði og vitan.
4. At menna førleikan innan tógvframleiðslu við at skipa fyri gransking og nýggjar royndir verða gjørdar við ull og ullaúrdráttum og leita upp nýggjar marknaðir.

Spinnaríið kann partvíst gerast eitt »fornminnaspinnarí«. Tá verður spinnaríið eitt stað, sum er opið fyri almenninginum, tað verður undirvíst og greitt frá fakinum ull og ulltilvirkan, søgu og mentan. Hetta er serliga áhugavert í sambandi við ferðavinnuna og kann eisini gerast ein inntøkugevandi partur av virkseminum.

Nú er so spunavirkið til sølu, og vóni eg inniliga, at tað eydnast at gera dreymin til veruleika. Sjálv haldi eg, at vit eru komin á evsta mark fyri at missa alla okkara siðvenju, bæði hvat seyði og ull viðvíkur. Uni Danielsen sigur í Dimmu, at eitt ferðafólk hevur sama virði sum eitt tons av toski. Um so er, er ikki minni umráðandi, at vit verja okkara egnu siðvenju og søgu, so vit hava nakað at bjóða teimum, ið koma. Ferðafólk ynskja vanliga at keypa nakað sermerkt. Vónandi fara allir peningaog mentanarstovnar at stuðla Sp/f Ullvirking 2002.

# FSF-aðalfundur

**Nevndin í Sandoyar Ítróttarfelag, B71**

Vit skulu her koma við nøkrum stuttum spurningum til formannin í kappingarnevndini hjá FSF.

**Upp/niðurflyting**

- Hvussu leingi hevur skipanin við upp/niðurflytingardystum verið roynd, siga tit?
- Hvørjir ítøkiligir trupulleikar hava verið at avgreitt dystirnar?

**Broytt kapping hjá 1.deild monnum**

Kappingarnevndin hjá FSF hevur gjørt av at broyta kappingina hjá 1.deild monnum. Spælast skulu 27 dystir í staðin fyri 18. Millum lítið og onki hevur verið at frætt um hesa broyting. Petur Simonsen, Finnur Helmsdal og formaðurin í kappingarnevnd FSF´s Bjarki Mohr hava í sjónvarpi og bløðum viðgjørt spurningin.

Í tí sambandinum seta vit formanninum í kappingarnevndini nakrar spurningar, sum hann passandi kann svara undan ella á sjálvum aðalfundinum.

Petur Simonsen hevur víst á, at broytingin helst hevur við sær, at royndu (eldru) leikararnir gevast fyrr, tá ið teir skulu vera í gongd 10 mánaðir um árið. Men Bjarki vísir hesum aftur í samtali við sjónvarpssendingina 3-2. Bjarki sigur m.a.:

"Eg haldi, at hasin óttin er ógrundaður. Teir meira royndu leikararnir - í eldra endanum - eru í gongd stórsta partin av árinum í forvegin, og tað eru júst hesir leikararnir, ið hava víst á, at vit noyðast at gera broytingar, skulu vit koma víðari"

- Bjarki, hvørjir eru júst hesir leikarar, tú vísir til, og hvar hava teir úttalað seg um málið?

Petur Simonsen hevur eisini víst á, at kanska skuldi kappingin byrjað í august og enda í góða veðrinum í juni mánaði. Til hetta sigur Bjarki Mohr í somu sjónvarpssending:

"Orsøkin til, at man velur hetta modellið er, at tað er kanska hetta modellið, man hevur skrivað mest álit um seinastu árini í FSF"

- Er tað møguligt hjá feløgunum at fáa hesi álit at síggja?

Petur Simonsen hevur víst á, at málið um broytingina í 1.deild hjá monnum hevur millum lítla og onga viðgerð fingið. Kappingarformaðurin sigur í SVF-sendingini:

"Tað hevði ikki gjørt sakina verri, men hinvegin kann man siga, at hetta málið hevur verið diskuterað í so nógv ár, farið gjøgnum langa búningar-process, so spurningurin er, um tað hevði broytt so nógv upp á viðurskiftini"

- Kann formaðurin í kappingarnevnd FSF vinarliga vísa á, hvar hetta málið hevur verið diskuterað í so nógv ár?

Við ítróttarkvøðu

# Opið bræv til Hans Paula Strøm, landsstýrismann

**Maria Jacobsen**

Í grein við heitinum »Sosiala deild undir sjóneykuna« í Sosialinum hin 5. juni 2004 úttalar Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, seg viðv. ávísum barnaverndarmáli, ið varð nógv umtalað í fjølmiðlunum í fjør. Úrslitið av málinum gjørdist sum kunnugt, at tvær systrar vórðu verandi í Føroyum, meðan beiggin hin 16. aug. 2004 varð fluttur til Danmarkar á samdøgursstovn.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sigur í samrøðuni, at hann »gjarna vil kanna, um Tórshavnar býráð hevur lýst málið nóg væl, og um Karup kommuna hevur fingið alt at vita í málinum, og tí er ein kanning sett í verk«.

Víðari sigur landsstýrismaðurin, at hann ikki veit, nær hann fer at fáa frágreiðingina um samskiftið millum Tórshavnar býráð og Karup kommunu.

Mær kunnugt hevur einki verið at frætt aftur frá hesi kanning, og loyvi eg mær tí at seta landsstýrismanninum hesar spurningar:

1. Hvør varð settur at kanna oman fyri nevnda mál?
2. Hevur landsstýrismaðurin fingið endaligu frágreiðingina?
3. Hvør var niðurstøðan í frágreiðingini?
4. Um frágreiðingin ikki er komin, nær kann hon so væntast?

Gott hevði verið, um Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, hevði viljað svarað mær hesum spurningum í fjølmiðlunum.

Takk fyri.